# FCK-spælarar misnøgdir við ferð í Føroyum

**Stórur partur av liðnum hjá FC Keypmannahavn er misnøgdur við venjingarleguna í Føroyum, skrivar danska heimasíðan Onside.dk. Formaðurin í FCK er í øðini og biður spælararnar halda munn**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*

– Tað er ikki tað besta at venja og spæla á graslíki, og tað er heldur ikki tað besta at spæla ímóti liðum, sum als ikki eru á okkara stigi.

Tað sigur liðformaðurin hjá FCK, Bo Svensson, við Onside.dk, eftir FC Keypmannahavn er komið heim av venjingarlegu í Føroyum.

Heimasíðan skrivar, at tað er bert ein grasvøllur í Føroyum, og tí mátti FCK venja og spæla ein dyst á graslíki.

Blaðið BT hevur eisini spurt seg fyri hjá onkrum spælarum, men teir hava hug at draga í land, og miðvallarspælarin Hjalte Nørregaard vil ikki leggja navn til atfinningarnar.

– Hatta má standa fyri teirra rokning. Tað var eitt sindur løgið at spæla á graslíki mitt um summarið, men tað var fínur túrur fyri tað, sigur hann við BT.

### Østergaard ikki blíður

Formaðurin í FC Keypmannahavn, Flemming Østergaard, er ikki blíður við sínar misnøgdu spælarar.

– Spælarar í FCK eru settir at gera eitt arbeiðið, og so skulu teir bara halda munn og gera, sum teir verða bidnir. Vit halda, at vit hava lagt eina sera góða og avbjóðandi skrá fyri fyrireikingarnar, sigur Flemming Østergaard við BT.

FCK-bossurin sigur við BT, at ferðin til Føroya orsaka av teimum mongu viðhaldsfólkunum, sum felagið hevur í Føroyum, og tí hetta vóru serligir dystir til heiðurs fyri Toda Jónsson.

– Todi hevur gjørt fantastiska nógv fyri felagið ígjøgnum nógv ár, og um tað eru onkrir spælarar, sum hava ein trupulleika av, at vit fóru til Føroya, so skal eg nokk fáa teir at tiga, sigur ein illur Flemming Østergaard.

### Todi er vónbrotin

Todi Jónsson, sum á ein ella annan hátt var høvuðspersónurin á ferðini í Føroyum, er keddur av umtaluni av ferðini.

– Eg eri vónbrotin av tosinum um túrin til Føroyar, sum er í hesum døgum. Eg var fegin um vitjanina i Klaksvík og Havnini, og toppurin í felagnum er eisini væl nøgdur við ferðina. Veðrið var ikki akkurat, sum man kundi ynskt, men tað vistu vit frammanundan, sigur Todi á heimasíðu sínari.

– Vit vandu og spældu á grasi. Tvær ferðir smávandu vit á graslíki, og í Klaksvík spældu vit á graslíkinum. Toppurin í felagnum var væl nøgdur, og føroyingar vóru so blíðir, sum bara føroyingar duga at vera. Meiri havi eg ikki at siga um tað, sum hevur staðið í donsku pressuni. Men eingin ivi skal vera um, at eg undrist á hetta, tí alt gekk, sum tað skuldi, sigur Todi.



*Hóast FCK fekk harða mótstøðu í venjingardystunum báðum í Føroyum, serliga í Klaksvík, tykjast leikararnir ikki halda nógv um Føroyavitjanina hjá felagnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Esbjerg kom víðari

Danska felagið Esbjerg kom um vikuskiftið víðari í europeisku Intertoto Cup, eftir at felagið vann samanlagt ímóti franska felagnum Nice. Fyrri dysturin endaði við 1-0 til Esbjerg, og á útivølli eydnaðist danska felagnum at fáa javnleik 1-1.

Harvið er Esbjerg, sum í fyrsta umfari av kappingini sendi NSÍ út, farið víðari í kappingini og skal nú spæla ímóti Vetra úr Litava.



*Helgi L. Petersen og NSÍ noyddust herfyri at lúta fyri Esbjerg í Intertoto-kappingini, og um vikuskifti noyddist franska Nice eisini at boyggja seg fyri donsku bronsuvinnarunum*

## Føst songartíð til Chelsea-stjørnur

Stóru stjørnurnar á liðnum hjá Chelsea hava nú fingið at vita, nær teir skulu í song, og hvussu teir annars eiga at bera seg at.

Nýggi venjarin hjá Chelsea, Jose Mourinho, hevur givið sínum spælarum ein bók við reglum, sum teir skulu fylgja. Spælararnir skulu í song seinast á midnátt, og teir skulu møta til felags morgunmat klokkan 9 hvønn morgun. Tá ið spælararnir hava ein frídag, kunnu teir vera uppi til klokkan 2 náttina fyri.

Íslendski álopsspælarin hjá Chelsea, Eidur Gudjohnssen sigur, at hann er hugtikin av, hvussu væl alt er skipað hjá tí nýggja venjaranum, og at hetta longu hevur betra um lagið í hópinum.

## Morten Olsen áhugaður í Týsklandi

Danski landsliðsvenjarin Morten Olsen vísir nú áhuga fyri starvinum sum landsliðsvenjari í Týsklandi, og hann noktar fyri, at hann skal hava takka nei til starvið.

– Tað hevði verið ein freistandi uppgáva fyri ein og hvønn venjara, serliga tá ið HM verður hildið í Týsklandi í 2006, sigur hann við týska blaðið Welt.

Sambært týskum fjølmiðlum er Morten Olsen besta boðið, um ein útlendskur venjari skal setast í landsliðsstarvið.

# Runavíkingar til Hvalba á venjingarlegu

**NSÍ ætlar sær á venjingarlegu í Hvalba nakrar dagar undan steypafinaluni ímóti HB á Ólavsøku.**

VENJINGARLEGA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt er upp til eina spennandi steypafinalu á Tórsvølli á Ólavsøku. Liðini í finaluni eru HB og NSÍ, og harvið er talan um eina endurtøku av finaluni fyri tveimum árum síðani, sum runavíkingar vunnu 2-1.

### Venja á grasi

Til tess at verða so væl fyrireikaðir sum gjørligt til finaluna, ætla runavíkingar sær á venjingarlegu í nakrar dagar undan sjálvari finaluni. Venjingarlegan hjá NSÍ verður í Hvalba, og tað er óivað tí, at hvalbingar hava tann eina av bert trimum grasvøllum í landinum. Steypafinalan verður jú sum teimum flestu kunnugt leikt á grasinum á Tórsvølli, og tí er tað avgjørt ein fyrimunur, at leikararnir hava havt høvi til at venja seg við at spæla á grasi í eina tíð frammanundan.

# Tríggir vilja verða landsliðsvenjari

**Herfyri hevði Hondbóltssamband Føroya lýsing í bløðunum, har lýst var eftir venjara til føroyska manslandsliðsliðið. Tríggir persónar hava søkt starvið**

HONDBÓLTSLANDSLIÐIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Áhugin fyri at gerast venjari hjá føroyska manslandsliðnum í hondbólti tykist ikki verða serliga stórur. Hóast lýst var eftir venjara í drúgva tíð, eru einans tríggjar umsóknir komnar til starvið.

### Vænta avgerð fyri ólavsøku

Rógvi Nielsen frá hondbóltssambandinum sigur, at av teimum trimum umsøkjarunum, hevur bert tann eini verið til samrøðu higartil. Av tí at summarfrítíð er, er trupult at savna fólk, men væntandi verða samrøður við hinar báðar umsøkjararnar í næstum, og Rógvi Nielsen væntar, at Hondbóltssamband Føroya fer at taka ein avgerð um, hvør næsti landsliðsvenjarin skal verða, áðrenn ólavsøku. Rógvi Nielsen vil ikki gera nakrar stórvegis viðmerkingar, men hann váttar tó, at allir tríggir umsøkjararnir eru búsitandi í Føroyum. Nýggi venjarin skal taka við eftir dananum Lars Nedergaard, sum í samráð við HSF legði frá sær fyrr í ár.




Statoil kring Føroyar

Hvør vinnur Bláu førara troyggjuna 2004





Bláa førara-troyggjan

Okkurt gott verður til áskoðaran, m.a. kaffi, sodavatn o.a.

Á øllum teinunum bjóðar Statoil tvíflís, kaffi og te til luttakararnar.

Fylgið við Statoil kring Føroyar á www.tsf.fo

Súkklukapping

**Dagur 1, Mikudagur 14. juli** Norðoyggjar - Prologur

**Startur og mál:** Statoilstøðin í Klaksvík

Teinur: Statoilstøðin, til byrgingina við Haraldsundi og aftur til Statoilstøðina.
Einkultstartur, uml. 8 km.

Kappingin byrjar kl. 18.15 og sigurshald verður uml. kl. 19.00

**Dagur 2, Hósdagur 15. juli** Eysturoy - 1. teinur

**Startur:** Rækjuvirkið á Oyri
**Mál:** *Statoilstøðin í Runavík*

Teinur: Oyri – Norðskála - Ljósárir – Eiðisskarð – Funningur – Funningsbotn – Oyndafjørður– Skálabotn - Undir Gøtueiði – Gøta - Leirvík (eftir niðara veg, til høgru áðrenn kirkjuna, eftir ovara veg út á gamla Leirvíksvegin) – Gøta – Runavík – Toftir - runt Agnið - Statoilstøðin á Saltangará (málið).
Longdin á teininum, uml. 113 km.
Umleið kl. 17:00 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Leirvík.
Umleið kl. 17.30 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Runavík.
Umleið kl. 17:50 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Runavík (á mál).

Kappingin byrjar kl. 15.00 og sigurshald verður uml. kl. 18:00

**Dagur 3, fríggjadagin 16. juli** Sandoy

**Startur og mál:** Statoilstøðin á Sandi.

Teinur: Statoilstøðin, inni í Traðardal, yvir um brúnna á Sandafløttinum, Statoilstøðin. Teinurin skal súkklast tríggjar ferðir.
Einkultstartur, uml. 27 km.

Kappingin byrjar kl. 17.00 og sigurshald verður uml. kl. 18.00

**Dagur 4, leygardagin 17. juli** Suðuroy

**Startur:** Statoilstøðin á Tvøroyri
**Mál:** Statoilstøðin í Vági

Teinur: Tvøroyri – Øravík – Fámjin – Øravík – Hov – Porkeri – Vág – Lopra – Sumba, um Hestin fram og aftur, har verður vent og súkklað verður til Vágs.
Samlaður startur, uml. 80 km.
Umleið kl. 14:00 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Vági.
Umleið kl. 15:00 koma fyrstu súkklararnir á mál. (við Statoilstøðina í Vági)

Kappingin byrjar kl. 12.30 og sigurshald verður uml. kl. 16:30

**Dagur 5, sunnudagin 18. juli** Streymoy

**Startur:** Við bygdarhúsið í Tjørnuvík.
**Mál:** Statoilstøðin í Gundadali.

Teinur: Tjørnuvík – suður gjøgnum Sundalagið – Kollafjørður – Oyggjarvegin – Tórshavn – Ringvegur – Gomlu rætt – Tórshavn – til høgru inn á Áargeil - oman eftir Gundadalsvegnum – til vinstru niðan eftir R.C. Effersøesgøtu – niðan til rundkoyringina – eftir vestara Ringvegi – til vinstru inn á Áargeil – Gundadalsvegur, rundteinurin skal koyrast íalt 3 ferðinar.
Samlaður startur, uml. 120 km
Umleið kl. 17.00 koma fyrstu súkklararnir framvið Statoilstøðini í Gundadali.
Umleið kl. 17.20 koma fyrstu súkklararnir á mál.

Kappingin byrjar kl. 14.00 og sigurshald verður uml. kl. 18.00

STATOIL
Kring Føroyar